VB-HB 0-2 (0-0):

# HB verður við á ólavsøku

**Øðrvísi fær niðurstøðan valla verið, eftir at HB vann fyrru hálvfinaluna móti VB á útivølli. Sum skilst var talan um fult uppibornan sigur til gestirnar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Um tað er skaðin ella úrslitið, sum fáa Gisla Sveinbjørnsson at vena seg, skulu vit lata vera ósagt, men tað er í øllum førum ein staðfesting, at VB hevði illa ráð til nakað av hesum*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

Fyrra hálvfinalan millum HB og VB varð leikt á Eiðinum í Vági grundlógardagin.

Bert fýra dagar framman undan høvdu liðini eisini spælt í Vági. Ta ferðina var talan um spennandi landskappingardyst, sum endaði málleysur, og mett eftir hesum, so var talan um eina ógvuliga opna uppgerð. Men hinvegin taldi tað eisini, at dystir í lands- og steypakappingini onkursvegna als ikki eru sambærligir.

Tað hevur nevnliga ofta verið so, at meðan HB hevur havt stórar trupulleikar av VB í landskappingini, so hava teir aloftast gjørt bart í steypakappingini, og soleiðis gjørdist eisini hesaferð.

### Linligur hálvleikur

HB hevði ikki framt so mikið sum eina broyting undan dystinum í mun til liðið, sum var á vøllinum seinast. Tað merkti, at talan aftur hesa ferð var um eina 4-3-3, og til at byrgja upp fyri hesum valdi VB enn einaferð at spæla við fýra monnum í verjupartinum.

Vágbingar høvdu tó broytt eitt sindur um sína uppstilling, og hesa ferð vóru Jón Gærdbo, Dan Djurhuus og Birgir Jørgensen allir á vøllinum frá fyrsta bríksli.

Fyrra umfarið var ikki so nógv, sum bendi á, at talan skuldi verða um stórt øðrvísi úrslit enn í landskappingardystinum. VB hevði vindin undan, og teir høvdu kanska eisini bóltin nakað meira, men veruligar málmøguleikar gjørdist talan sjálvdan um. Tað gjørdist tað heldur ikki hjá HB. Eina ferð høvdu teir tó bóltum í meskunum, men málið varð tó kolldømt.

### Loysnaði í seinna

Í seinna hálvleiki var tó skjótt sjónligt, at HB nú var við at skapa sær eina yvirvág í dystinum. Við vindinum undan fingu teir flutt spælið niðan móti VB-málinum, og longu eftir tíggju minuttum gav hetta úrslit.

Jón Rói Jacobsen sendi langt oman í VB-brotsteigin. Bjarni Johansen kom úr málinum, men áðrenn hann fekk gjørt nakað, var Røgvi Jacobsen komin ímillum, og við kollinum stýrdi hann bóltin upp um málverjan og í málið.

Í mun til so nógvar aðrar dystir hjá HB, so viðførdi leiðslumálið hesaferð ikki, at teir duttu ov langt aftur á vøllin. Framvegis høvdu teir gott tak á dystinum, og knappar tíggju minuttir eftir leiðslumálið gav hetta aftur úrslit.

Aftur hesa ferð hevði Jón Rói ein fingur við í spælinum, og aftur hesa ferð var tað Rógvi, sum átti seinasta fótin. Jón Rói rann frá alt og øllum, tá ein long sending varð løgd inn um VB-verjuna, og komin inn í brotsteigin, vórðu beinini tikin undan honum.

Andrew varð settur at skjóta. Bjarni hálvbjargaði royndini úr ellivu metrum, men meðan allir vágbingarnir at kalla stóðu sum áskoðarar, fylgdi Rógvi Jacobsen upp á returin, og so var dysturin mest sum avgjørdur.

Vágbingar fingu ongantíð veruliga trýst HB eftir hetta, og sum heild vóru havnarmenninir eisini nøgdir, tó at teir kundu fingið enn eitt mál, tá Rúni Nolsøe og Bjarni Jørgensen gjørdust púrasta leysur, men linjudómarin veittraði tó fyri rangstøðu, tá Rúni rullaði tvørturum.

### Skaðar arga

Samanum tikið, so var talan um ein fult uppibornan sigur til HB, og við tveimum málum í posanum hava teir nú meira enn annað beinið ólavsøkufinaluni.

Fyri HB mundi tað tó koma illa við, at tveir av vanliga føstu leikarunum vórðu skaddir. Heilt tíðliga í dystinum noyddist Tór-Ingar Akselsen av vøllinum, og beint undan dystarloki noyddist Hallur Danielsen av vøllinum, tá hann beklaði fótin.

Heldur ikki vágbingarnir sluppu snikkaleysir. Gisli Sveinbjørnsson, sum nú hevur vunnið sær mest sum fast pláss í vinstra borði, mátti somuleiðis av vøllinum við skaða. Hann kom aftur á vøllin, men tað var tó sjónligt eftir hetta, at hann var darvaður av tilburðinum.

Fyri báðar partar kemur hetta sum vera man illa við. HB skal sunnudagin spæla týdningarmiklan landskappingardyst á Toftum. Tá er Jóhannis Joensen leikbannaður, og missur liðið eisini teir báðar, Hall og Tór-Ingar, verður neyðugt við fleiri flytingum, fyri at fáa kabalina at ganga upp.

Hjá VB tykist støðan ikki minna sørt um hana, sum HB var í í fjør. Skaðar í hópatali hava longu rakt liðið, og tað eru valla tveir dystir á rað, har venjarin hevur kunna nýtt somu ellivu leikararnar. Møguliga var skaðin hjá Gisla ikki serliga álvarsligur, men undir øllum umstøðum munnu vágbingar halda, at teir longu nú hava fingið nóg mikið av skaðum í sín part hetta kappingarárið.

### Dysturin í tølum:

**VB-HB 0-2 (0-0):**
0-1: Rógvi Jacobsen, 55
0-2: Rógvi Jacobsen, 63

**VB:** Bjarni Johansen – Predrag Zivkovic, Slobodan Madzar, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen – Dan Djurhuus, Mortan úr Hørg, Jón Gærdbo, Gisli Sveinbjørnsson – Birgir Jørgensen, Nenad Zivanovic
**HB:** Bárður Johannesen – Tór-Ingar Akselsen, Jóhannis Joensen, Jan C. Dam, Hans á Lag – Rúni Nolsøe, Rógvi Jacobsen, Hallur Danielsen – Jón Rói Jacobsen, Uni Arge, Andrew av Fløtum

# Líkist endurtøku

**Báðir finalistarnir frá í fjør, HB og KÍ vunnu fyrru hálvfinalurnar mikukvøldið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Finalan í steypakappingini hjá kvinnum tykist aftur í ár at skula standa millum KÍ og HB. Í fjør vann HB í einum sera spennandi dysti, og tó at styrkismunurin millum liðini tykist stórur í løtuni, so ber væl til at ímynda sær, at HB við einum styrktum liði kann gera um seg kortini.

### Eingin ivi

Í Klaksvík var eingin ivi um, hvat betra liðið var, tá tey bæði fremstu liðni í fyrstu deild, KÍ og B36 tókust. Eftir ein heldur ivandi byrjan, har bæði liðini høvdu sínar møguleikar, var tað KÍ, sum spakuliga tók yvir, og tá farið var um hálva tíman, komu tær uppiborið á odda, tá Rannvá Andreasen smekkaði til av brotsteigarmarkinum.

Leiðslan sendi sjálvsálitið hjá klaksvíkingunum nakað væl uppeftir, og takið, sum tær høvdu vunnið sær undan steðginum, gjørdist alsamt sterkari, sum tíðin leið.

Rannvá Andreasen økti tíðliga í seinna hálvleiki til 2-0, og um miðjan seinna hálvleik staðfesti Kristina Eyðbjørnsdóttir sigurin.

Trý mál móti føroyameistarunum og helst sterkasta liðnum í landinum verður ivaleyst ein meira enn møtumikil uppgáva hjá B36 at vinna aftur. Sjálvandi er møguleikin til staðar, men alt bendir í hvussu so er á, at KÍ fjórða árið á rað skal hava annan sessin í steypafinaluni.

### Tepur HB-sigur

Í hinari hálvfinaluni hittust HB og B71. Liðini spæla í hvør sínari deild, men tað var tó ikki so øgiliga nógv í dystinum, sum bendi á, at HB átti at verið væl sterkari.

Kanska vóru tað tær á heimaliðnum, sum høvdu bóltin nógv meira, men tær høvdu meira enn trupult við at spæla seg fram til nakrar veruligar málmøguleikar, og komu tær ígjønum, so var ein væl spælandi sandoyarmálverji altíð fyri.

Ikki fyrr enn móti dystarenda bar til hjá heimaliðnum. Annika Thomsen, sum hevði verið heilt stutt á vøllinum, fekk seinasta fótin á, tá HB enn einaferð hevði spælt seg inn í brotsteigin, og so var sigurin tryggjaður.

Við leiðsluni hevur HB sjálvandi fyrimun undan seinnu hálvfinaluni, men tað verður tó spennandi at vita, um sandoyarkvinnurnar fyri fyrstu ferð skulu megna at spæla seg fram til finaludystin í steypakappingini.

**KÍ-B36 3-0 (1-0):**
1-0: Rannvá Andreasen
2-0: Rannvá Andreasen
3-0: Kristina Eyðbjørnsdóttir

**HB-B71 1-0 (0-0)**
1-0: Annika Thomsen



*KÍ hevur fjórða árið á rað sett beina kós móti steypafinaluni, har HB má vera favorittur at gerast mótstøðuliðið*
*Mynd: SáH*



# Góð undirtøka í regninum

**Í grimdar regninum leygardagin bleiv skotið fyri ársins fyrstu Grand Prix súkklukapping. Hóast veðrið ikki var við fyriskiparunum, ja so var undirtøkan eftir umstøðunum góð – serliga millum yngru dreingirnar**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*




*Gunnar Dahl-Olsen vann fyrsta umfarið av Grand-Prix kappingini, men eitt nú fekk hann sera harða mótstøðu frá Eli Christiansen*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tórshavnar Súkklufelag skipar aftur í ár fyri súkklukappingum í samband við summarstevnurnar kring landið. Kappast verður á flest øllum stevnunum og eins og hini árini verður vinnarin samanlagt, heiðraður á Ólavsøku.

Børnini sleppa somuleiðis at royna seg, og kappast eisini eftir Grand Prix skipanini.

Luttøkan var, um ein hugsar um veðrið, rímiliga góð, og heldur óhugaligt var hjá súkklarunum at byrja, men tá so byrjað var, ja so gloymdu súkklararnir alt um veðrið, og allar kreftir vóru settar inn fyri at gerast fremstur.

Teinurin gekk frá Biskupsstøðgøtu, eftir Skúlavegi, eftir Gerðagøtu og so aftur á Biskupsstøðgøtu.

Tey vaksnu súkklaðu í 40 minuttir. Síðan bleiv ringt og so var bara eitt umfar eftir.

Børnini súkklaðu frá trimum upp í fimm umfør. Tey minstu trý og tey størstu børnini fimm. Teinurin var 675 metrar.

### Gunnar vann

Hjá teimum vaksnu gekk best hjá Gunnari Dahl-Olsen, men hann fekk skarpan gang frá unga talentinum Eli Christiansen, ið nú telist millum sterkastu súkklararnar í landinum.

Gunnar royndi at koyra frá hinum tá umleið 20 minuttir vóru farnir. Hann fekk eitt gott hol aftur til hinar, men løtu seinni høvdu Eli og Esmar koyrt hann inn aftur. Løtu seinni rykti Gunnar aftur, slapp aftur leysur frá Esmar og Eli, men aftur megnaði Eli at koyra Gunnar inn aftur. Hesa ferð uttan Esmar.

Klokkan gekk, klokkan ringdi og so fóru Eli og Gunnar út á seinasta umfar. Báðir høvdu koyrt hart og beinini vóru nú blivin troytt. Eli byrjaði spurtin ov tíðliga, og tí slapp Gunnar framum tá umleið hálvur umgangur var á mál, og vann við umleið 5 sekundum.

### Gloymdu heiðursmerkini

Hjá teimum elstu dreingjunum gekk væl hjá Hans Krosstein úr Klaksvík. Hann súkklaði væl og vann so ruddiliga á Bergur Johansen, ið gjørdist nummar tvey. Sigast skal tó at ketan hjá Bergi datt av, tí varð munurin so stórur. Nakað seinni kom Poul Andrias Ziska á mál.

Reidar Luid var somuleiðis væl koyrandi, og eisini hann vann trygt á nummar tvey í bólkinum 9 til 11 ár, Rani G. Jacobsen. Reidar vann við umleið 30 sekundum. Nummar trý gjørdist Teitur Gestsson.

Meðan tað hjá fjølmiðlum ofta kemur fyri, at børnini og tey verða skúgvað til viks, til fyrimuns fyri tey vaksnu, so vendið súkklufelagið byttuni hesaferð. Í øllum regninum gloymdu teir vaksnu seg sjálvar, tá teir góvu børnunum heiðursmerkini. Tá kappingin var liðug, undraðist onkur á, at eingin vaksin ella unglingur hevði heiðurstekin.

Hetta var serliga keðiligt fyri Dánjal Michaelsen sum súkklaði saman við teimum vaksnu, men vann unglingabólkin. Tórshavnar Súkklu Felag lovar at løna honum tvífalt næstuferð, vinnur hann eisini tá.

## Úrslit av Grand Prix 2002 súkklingini á Norðoyastevnu:

**Menn:**

| Nr. | Navn | Stig |
|---|---|---|
| 1 | Gunnar Dahl-Olsen | 40 |
| 2 | Eli Christiansen | 34 |
| 3 | Esmar Joensen | 30 |
| 4 | Evald Rasmussen | 26 |
| 5 | Geyr Gilsteinsson. | 23 |

**Unglingar 14 til 17 ár:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Dánjal Michaelsen | 40 |

**Gentur 6 til 8 ár:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Gunnvá G. Jacobsen | 40 |

**Gentur 9 til 11 ár:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sára Olsen | 40 |
| 2 | Kristina á Høvdanum | 34 |
| 3 | Elsa Krosstein | 30 |

**Gentur 12 til 14 ár:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Elsa F. Petersen | 40 |
| 2 | Lisabet Thomsen | 34 |

**Dreingir 6 til 8 ár:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Kári Olsen | 40 |

**Dreingir 9 til 11 ár:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Reidar Luid | 40 |
| 2 | Rani G. Jacobsen | 34 |
| 3 | Teitur Gestsson | 30 |
| 4 | Sigmundur Olsson | 26 |
| 5 | Finnur Mellemgaard | 23 |
| 6 | Niels Christiansen | 20 |
| 7 | Bárður í Bø | 18 |
| 8 | Bartal Andreasen | 16 |
| 9 | Berint Kalsø | 15 |
| 10 | Atli Carlsen | 14 |

**Dreingir 12 til 14 ár:**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Hans Krosstein | 40 |
| 2 | Bergur Johansen | 34 |
| 3 | Poul Andreas Ziska | 30 |

## Leggja einki í trygdina

**Róðrarsamband Føroya átalar við hesum líkasæluna hjá summum róðrarfeløgum, tá ið ræður um bjargingarútgerð í kapp-róðrarbátum**

**Trygd**
*Róðrarsamband Føroya*

Síðan 1991 hevur verið arbeitt við at bøta um trygdina á kappróðrarbátum. 16. mars 1999 lýsti Fiskimálastýrið endaliga kunngerð um bjargingarútgerð á kappróðrarbátum, eina kunngerð, sum allir partar vóru samdir um.

Í henni stendur millum annað í grein 1, at tá lagt verður frá landi, skal øll manningin vera í góðkendum bjargingarvesti. Víðari stendur, at undir stevnuróðri er ikki neyðugt at vera í vestinum, men hann skal vera tøkur í bátinum, og høvuðsdómarar kunnu áleggja manningunum at fara í teir.

Soleiðis var á norðoyastevnu tann 1. juni í ár. Veðrið var somikið ringt, at høvuðsdómararnir áløgdu manningunum at fara í vestarnar. Tíverri høvdu fleiri manningar ikki vestarnar við sær, soleiðis sum kunngerðin áleggur, og hetta átalar Róðrarsambandið.

Síðan er Róðrarsambandið eisini komið eftir, at fleiri av vestunum, sum nýttir vórðu á norðoyastevnu, høvdu onga CO2 fløsku, sum er neyðugt fyri at blása vestarnar upp. Her er tískil talan um falska trygd og eina deyðsfellu hjá teimum, sum nýta vestarnar, og ivasamt er, um tey øll vita av hesum.

Hetta verður við hesum harðliga átalað, og álagt verður viðkomandi feløgum at fáa hetta í rættlag í stundini. Gjørt verður somuleiðis vart við, at Vaktar- og bjargingartænastan er kunnað um støðuna.